

*Barrvørðurin Luigi selur fegin ein drykk fyri eina søgu – ella enn betur – fyri eina lívslygn*

# Luigi gav grugginum sál

**Frálíkir leikarar góvu okkum sorgblíðu lagnurnar á Café Grugg á ólavsøku, men tað var italiski barrvørðurin Luigi, sum gav okkum eyguni at síggja tær við**

## Ummæli

**Anna V. Ellingsgaard**
anna@sosialurin.fo

Tað gekk ein løta, áðrenn eg varnaðist tey – eyguni og andlitsbrøgdini á italska barrvørðinum Luigi, sum roynir at halda saman uppá sítt lív og sína barr í leikinum Café Grugg á Gamla Meiaríinum.

Ikki tí – Luigi, leiktur av frálíka Gutta Winther, kom út í hvønn krók í rúminum við sínum herliga italska aksenti og veipandi ørmum. Men tað vóru eyguni á honum, sum forvitin og sprellivandi fylgdu við í øllum, sum fór fram, sum góvu leikinum júst tað, sum gjørdi Café Grugg til so nógv meir, enn bara eina kabaretlíknandi røð av sketsjum.

### Kong Luigi

Spelkin stendur hann har, Luigi, við italska yvirskegginum og pussar gløs, meðan hann skoðar yvir sítt ríkið – barrina, sum er vorðin hansara umbering fyri at liva, um ikki sítt egna lív, so lívið hjá gestunum. Altíð klárur at selja ein drykk fyri eina góða søgu, ella enn betri – eina góða lívslygn, sum gestirnir á Café levera í einum jøvnum streymi.

Og Luigi tekur heldur enn fegin ímóti teimum øllum. Við ræðslu í eygunum, tá tuflaði Hilmar kansak hevur dripið konu sína, við tárum á kjálkunum, tá mamma hill-billyarin Hans Jakku Paula doyr, við uggandi røðd, tá keðiliga Jana viðgongur, at hon pellaði á chattinum um, at hon líkist eini latino útgávu av Pamelu Anderson.

Luigi tímir at lurta eftir teimum, sum ongin annar tímir at lurta eftir. Og hansara vinsæli máti at síggja tey ger, at áskoðaranir eisini tíma at hyggja eftir hesum kiksaðu tilverunum, sum vit annars bert hava eitt óbehagiligt tarnakrymp til yvirs fyri.

### Hvar hava vit sæð tey fyrr?

Har er avdankaða dullan í alt ov strammum skríggjandi grønum buksum, sum hevur gjørt tað til ein lívsstíl at bidda seg til enn ein drykk, og sum bara ein sum Ria Torgarð megnar at gera til eina sanna diva í síni egnu bíligu tivoli-verð. Tuflaði Hilmar, sum Hans Torgarð gevur ein so forkrampaðan kropsburð, at vit fáa ilt bara av at hyggja at honum. Gráa gamla gentan Jona, sum Barbara Chrstophersen ger so sannførandi keðiliga, at tú spyrt teg sjálva, hvar tað nú er, tú hevur hitt hana fyrr. Og ikki minst verðinsmaðurin Hans Jakku Pauli, sum lítið annað hevur at hava sítt meistaraheiti í, enn "Greatest" merkinum á rygginum á cowboyjakkanum, var tað ikki fyri gjøgnumførdu bodybuildaralíkandi hábrøgdini hjá Kjartani Hansen.

Tá ongin tímir at lurta eftir honum meir, setur hann seg á pallin í barrini við gittaranum og droymir seg "On the road again", sum er á leið tað einasta, hann ikki er. Ella hann trívur í "A ghost rider in the skye" og fær Luigi við sær inn í ein villan western, har hvørki John Wayne ella Clint Eastwood koma upp á øklarnar á teimum.

### Út í náttina ...

Og soleiðis halda tey á at lúgva fyri sær sjálvum og hvørjum øðrum og áskoðaranum á Café Grugg, og billa sær inn, at tey ikki eru tuflaði ella kiksaði ella avdankaði. Og ímeðan kunnu vit áskoðarar fara út í náttina, meðan vit billa okkum inn, at lívsins sjónleikur og lívslygnirnar hildu uppat, tá hurðin á Gamla Meiaríínum lat aftur, tá lukkuligi Luigi ikki hevði tíð at spæla við meir, tí hann fann kærleikan í keðiligu Jonu ...

Sosialurin